

*Jóannes Johannesen í Leirvík keypti Arizonu í 1919, og hevði hana, til hon fórst undir Selvogsbjørgum í 1932*



*Fríðrik Bláhamar, ættaður úr Elduvík, búsitandi í Vestmanna, varð síðsti skipari á Arizonu*

brotnaði tvørtur av.

Vit hildu tó á til Funnings og Elduvíkar, har vit tóku nakrar mans umborð, áðrenn vit komu til Vestmanna, har skiparin, Fríðrik Bláhamar, hoyrdi heima. Her varð skaðin afturgjørdur.

## Fráferðin

Umvælingin var liðug mánadagin 2. apríl. Sama dag mynstraðu vit, og vit fóru avstað á kvøldi.

Longu hósmorgunin byrjaðu vit at fiska á Selvogsbankanum, har flestu skipini høvdu fingið uppí í mars. Tískil var bert hálvur annar mánaður eftir av sesongini.

Byrjanin á túrinum var bæði spennandi og strævin. Veiðan var so stór, at tað stóð á at reinsa fiskin. Elsti maður umborð var 60 ár. Síðan vóru tveir ungir dreingir við, sum vóru fyrsta túrin. Teir sovnaðu undir reinsingini, so strævið var tað.

Tá ið vit endaðu vikuna leygardag á midnátt, høvdu vit bert havt frívakt í 10 tímar tilsaman ella 3 tímar fyri samdøgri.

Veðrið var sera gott, tá ið hugsað verður um árstíðina. Tað var kølið, frálandsvindur, og tað var slætt í sjónum.

Leygardag seinnapart frískaði upp, og tað merktis eisini á skipinum. Her á leiðini skuldi ikki roknast við álítandi veðri leingi í senn.

Størsti parturin av flotanum á Selvogsbankanun helt sunnudag í Herdisarvík, eitt øki við góðum akkersplássi. Strondin her á leiðini hevði ringt orð á sær orsakað av øllum teimum skipum, sum vóru gingin burtur á hesum leiðum í pálandsstormum og kavaroki.

Men tá ið veðrið var gott, plagdu skipini at fara inn higar leygarkvøld at halda sunnudag. Hetta hendi nakrar ferðir á vári, men ikki fyrr enn sluppirnar fingu motor. Í deyðsiglaratíðini hildu skipini til úti á djúpum vatni. Sum fyrsta skip ankraðu vit heilt inni á víkini, bert einar 200 metrar frá landi. Her inni var blikalogn, og sjógvurin rørdi seg ikki.

Tað einasta vit sóu av húsum, var ein bóndagarður. Bóndin vitjaði okkum saman við einum húskalli, sum róði teirri lítliu jollina, teir komu við. Gestirnir fingu seinnapartskaffi. Teir tosaðu nógv, men vóru ikki heilt lættir at skilja. Tað sama søgdu teir helst eisini um okkara føroyska. Tá ið teir høvdu drukkið, fóru teir avstað aftur, men prajaðu nøkur av honum skipunum, sum lógu á víkini.

## Aftur til havs

Longu seint seinnapartin dró ein slupp fyri og onnur eftir akkerið inn og stevndi til havs við fullari ferð. Tær seinastu 8-9 sluppirnar, og millum hesar Arizona, fóru út um 8-9 tíðina. Barometrið var nógv fallandi, men tað merktist kortini einki til, at eitt illveður var í nánd. Bóndin hevði tó sagt, at roknast kundi við broyting í veðurlagnum nær sum helst. Tá vildi vindurin koma av suðri, og merkti hetta frálandsvindur. Enn var heldur eingin súgur, sum plagdi at vera undan knappligari broyting í veðurlagnum.

Vit vóru enn 5-6 tímar á hesum róliga akkersplássinum. Nakrir av monnunum fingu sær eitt slang. Aðrir fingu sær ein drekkamunn ella upp í pípuna.

Vit skuldu hava nátturða eisini, hóast hann ikki var so spennandi. Vit høvdu enn breyð eftir, sum var heimanifrá frá Frants Restorff. Hetta breyð mátti etast, áðrenn kokkurin fór at baka. Vit kallaðu breyðið Restorffs sement, so hart var tað, og vit koyrdu nógv margarin á fyri at fáa tað niður.

Klokkan sjey varð ruddað av borðinum, og tá skuldi skiparin sum vanligt lesa lestur. Hetta var ein langur og ikki serliga spennandi lestur, so fleiri sovnaði.

Aftaná lesturin hildu skiparin og fyrri bestimaður eitt stutt missiónsmøti, og her var meira lív í.

Aftaná fóru allir upp á dekkið, hálaðu akkerið inn og hivaðu seglini.

Ein nýggj vika var byrjað við vónum um góða veiðu. Hetta valdaðist tó veðrið, og tað vóru neyvan grundir til at halda, at tað fór at gerast fiskiveður mánamorgun.

Bert ein tíma seinni, umleið kl.10, frískaði upp av útnyrðingi.

## Veðurbroyting

Við vaktarskiftið á midnátt var vindurin farin í ein stívan kuling frá vestri. Tað vísti seg beinanvegin at fara at passa, sum bóndin hevði sagt. Hansara forsøgn gjørdist ikki minni álítandi, sum náttin leið. Hann visti, hvat ið hann tosaði um.

Tað var eisini ofta, at skip vóru gingin burtur júst á hesum leiðum við slíkum knappligum broytingum í veðurlagnum frá norðan til útsynning við avfalli.

Vakthavandi bestimaðurin kom skjótt eftir avloysing niður undir at fáa sær ein skjótan kaffimunn. Klokkan var um hálvgum eitt, og frívaktin svav longu uttan órógv um óvissuna í veðrinum.

Deksvaktin tyktist heldur ikki at stúra, hóast tað øtlaði, og sýnið gjørdist verri orsakað av avfallinum.

## Skipið stendur

Men knappliga skakaðist skipið so nógv, at okkurt mátti vera hent. Tað føldist sum at vera í lastini á einum lastbili, sum koyrir eftir einum holutum vegi.

"Hvat hendi?" sigur bestimaðurin, sum hann stóð við lugarborðið við krússinum í hondini. Hann blakaði krússið frá sær og rann upp á dekkið saman við teimum fimm monnunum, sum sótu í lugarinum.

Ein løtu seinni var alt ein hurlivasi. Allir róptu: "Vit hava tikið botn". Tað varð rópt niður í lugarið og kahúttina: "Komið upp, komið upp, skundið tykkum, vit ganga burtur!"

Hóast alt rokið, lá frívaktin enn í fasta svøvni. Men henda harðliga útpurringin gjørdi kortini, at teir hálvt sovandi menninir bóltaðu úr koyggjunum, og komu upp á dekkið í berum undirklæðum.

Skiparin, sum eisini var í undirklæðum, fór beint í stýrihúsið og roynda at bakka skipið av. Men hetta vísti seg skjótt at vera heilt ómøguligt. Skipið hevði tikið í botn og varð av sjógvi og vindi trýst inn móti landi og kom tað skjótt at standa fast á einum skeri. Skipið varð standandi, men tað fór við aldunum í bæði borð.

## Í bjargingarbátarnar

Undir hesum ringu umstøðum royndu vit at koma í bjargingarbátin. Báturin furaði nakrar ferðir tvørtur um dekkið, men tá ið stýriborð fór undir sjógv, fór báturin av sær sjálvum á sjógv.

Frá hesi løtu hendi alt so skjótt, at eingin okkara seinni fataði, hvussu hetta kundi fara fram uttan tap av nøkrum av manningini. Tað var bølamyrkt, og tað var heglingur við stuttum steðgi millum ælini. Náttarmyrkrið saman við avfallinum gjørdi tað sera trupult at gerast leysir av skipinum, sum fór undan brotunum í sjónum.

Motorurin var steðgaður. Men hann var kortini ikki til nakra nyttu. Men hinvegin hoyrdu vit betri hvønn annan, stormin, brotini, neyðarrópini. Serliga ringt var tað at hoyra teir báðar yngstu, sum grótu og róptu eftir mammu síni.



*Harald dámdi einki sjálvdrátt. Hesar báðar myndirnar úr bókini um Jóan Petur hjá Mouritsi vísa, hvussu sjálvdrátturin virkaði. Her sker maður lippu…*



*… og her verða lippurnar taldar*